# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eg og Rumsfeld vóru samdir um, at hann átti at leggja frá sær*
*George W. Bush*

# Hamas lovar hevnd



*Hesin drongurin var millum tey sjey børnini, sum doyðu í ísraelska granatálopinum*

**Altjóða samfelagið fordømir ísraelska álopið á Beit Hanoun, og Hamas lovar at hevna álopið**

– Hesaferð fara vit ikki at svara við orðum, men við gerðum, sigur leiðarin í Hamas, Khaled Mashaal, eftir blóðuga ísraelska álopið á palestinska býin Beit Hanoun í Gaza-geiranum.

Minst 18 palestinar, teirra millum sjey børn, doyðu, tá ísraelsmenn skutu við granatum eftir einum íbúðarøki í býnum gjáranáttina. Útlendskir eygleiðarar ávara um, at tað blóðuga álopið fer at øsa víðgongdar palestinskar bólkar, og at ísraelsmenn tí kunnu vænta hevndarálop.

Palestinski forsetin, Mahmoud Abbas, og forsætisráðharrin, Ismail Haniyeh, fordømdu ísraelska álopið, og teir hava lýst landasorg í tríggjar dagar fyri at minnast tey deyðu.

ES og Noreg hava eisini fordømt álopið, og russiska uttanríkisráðið sigur, at ísraelska framferðin oyðileggur ísraelsku royndirnar at forða rakettálopum úr Gaza. Amerikanski forsetin, George W. Bush, plagar at vera varin, tá tað snýr seg um Ísrael, men í gjárkvøldið segði hann, at Ísrael eigur at vísa varsemi, og hann segði seg vóna, at slíkt ikki hendir aftur.

- Ísrael hevur boðað frá, at málið verður kannað, og tað er okkara vón, at kanningin verður gjørd skjótt, og at Ísrael tekur neyðug stig til tess at forða fyri, at tað slepst undan slíkum syndarligum tilburðum, segði Bush.

Ísraelski forsætisráðharrin, Ehud Olmert, hevur sagt, at herleiðslan hevur fingið boð um at kanna tilburðin í Beit Hanoun, og at herurin fer ikki at fremja fleiri álop, meðan málið verður kannað. Talsmenn hjá herinum hava sagt, at tað slepst ikki undan slíkum, tí palestinskir álopsmenn fjala seg millum sivilfólkið.

# Ein umstríddur maður lagt frá sær

**Summi halda Donald Rumsfeld vera ein rættan amerikanara. Onnur skýra hann ein eirindaleysan krígsharra**

Valósigurin hjá republikanarunum kostaði Donald Rumsfeld starvið sum verjumálaráðharri. Tað var fyrst og fremst Irak-kríggið, sum kostaði republikanska flokkinum meirilutan í Kongressini, og Rumsfeld hevur verið ímyndin av amerikonsku krígsførsluni har. Tí kostaði tað honum sessin.

Sum verjumálaráðharri hevur tann 74 ára gamli Rumdfeld verið ein umstríddur maður. Tey, sum halda av honum, siga, at hann er ein rættur amerikanari, og at hann hevur styrkt amerikanska hervaldið. Hansara mótstøðufólk siga harafturímóti, at hann er ein eirindaleysur krígsharri, sum ikki skilti tann blóðuga uppreisturin í Irak. Og so oyðilegði hann tað góða umdømið, sum USA hevði, tá hann gav herinum loyvi til at pína fangar.

Sum ráðharri hevði Rumsfeld ábyrgdina av innrásunum í Afghanistan í 2001 og í Irak í 2003.



*Donald Rumsfeld - ein umstríddur maður*

Tað var hann, sum skipaði fangaleguna í Guantanamo, og sum ráðharri var hann fyri hvøssum atfinningum, tá myndirnar frá fangapíningini í Abu Ghraib komu fram.

Fyrr í ár kravdu nakrir fyrrverandi generalar, at Rumsfeld bleiv koyrdur frá. Teir vildu vera við, at framferðin hjá herinum í Irak var skeiv, og at verjumálaráðharrin vildi ikki lurta eftir sínum generalum og ráðgevum. Eitt nú høvdu generalarnir mælt honum til at senda fleiri hermenn til Irak, men Rumsfeld helt uppá, at tað var ikki neyðugt, tí USA skuldi brúka hátøknilig vápn heldur enn hermenn.

Donald Rumsfeld hevur verið verjumálaráðharri tvey tíðarskeið. Sum 43 ára gamal bleiv hann tann yngsti verjumálaráðharrin nakrantíð í stjórnini hjá Gerald Ford, forseta í 1975 og nú aftur í Bush-stjórnini.

Hann líður onga neyð, nú hann er farin frá. Sambært amerikonskum fjølmiðlum forvann hann fleiri milliónir dollarar í stjóra- og nevndarsessum ímillum tey bæði tíðarskeiðini í Pentagon.

## STUTT SAGT

### Grønar lendingar

Sum tað fyrsta í heiminum hevur skandinaviska flogfelagið SAS sett sær fyri at brúka umhvørvisvinarligar ella grønar lendingar, sum skulu hava við sær, at $CO_2$-útlátið verður skert munandi. Ein nýggj samskiftisskipan skal gera, at flogførini kunnu sveima niður og inn ímóti flogvøllinum, soleiðis at tey næstan kunnu sløkkja motorarnar. SAS vónar at spara 100 kilo av brennievni fyri hvørja grøna lending, og $CO_2$-útlátið verður umleið 300 kilo minni fyri hvørja lending enn nú. Tað eru svenska deildin hjá SAS, svensku loftferðslumyndugleikarnir og flogverksmiðjurnar Boeing og Airbus, sum samstarva um ætlanina, skrivar Aftonbladet. SAS hevur roynt 300 grønar lendingar í seinastuni, og úrslitini hava verið góð, skrivar blaðið.

### Ringur turkur

Tað hevur ikki regnað í stórum pørtum av Avstralia í langa tíð, og sambært myndugleikunum er talan um tann ringasta turkin í eini hundrað ár. Umleið helmingurin av tí dyrkaða lendinum í landinum er rakt av turkinum, og myndugleikarnir hava gjørt av at veita bóndrunum fíggjarligan stuðul fyri at avmarka missin. Sambært Peter McGauran, landbúnaðarmálaráðharra, fer stuðulin at kosta tí almenna minst eina milliard krónur.

### Bumbaðu fótbóltsdyst

Átta spælarar doyðu, tá ókendir menn skutu við bumbuvarpara eftir einum fótbóltsvølli í Bagdad í gjár. Vøllurin er í tí fátæka shiamuslimska Sadr-býarpartinum. Umframt teir átta spælararnar, sum doyðu, vórðu minst 20 áskoðarar særdir. Tað seinasta samdøgrið hevur verið sera blóðugt í Irak. Myndugleikarnir siga, at minst 60 fólk hava latið lív ymsastaðni í landinum. Eitt nú doyðu sjey fólk í einari sjálvmorðsatsókn, og 14 onnur doyðu, tá amerikanskir hermenn søktu av uppreistrarmonnum.